*Nils Trulsvik, stjóri í seismikfyritøkuni Nopec:*

# Altjóða oljufeløg stóran áhuga fyri Føroyum



*Nils Nilsen Trulsvik, geofysikari og umsitingarligur stjóri í Nopec*

*Bíða nú bert eftir úrslitum frá seismiskum kanningum. Norska fyritøkan Nopec bjóðar seg fram at gera hesar kanningar ókeypis. Tær kosta teimum einar 30 mill. kr. Møguleiki er at byrja longu í vár og hava eitt úrslit við árslok. Fyritøkan hevði í farnu viku fund við landsstýrið saman við umboðum frá føroyska felagnum Kolan, sum hevur søkt um loyvi at byrja seismiskar kanningar.*

Nils Trulsvik, stjóri sigur, at teir arbeiða við seismiskum kanningum um alla verðina. Teir savna upplýsingar og hava so serfrøðingar, sum týða hesar upplýsingar við ti fyri eygað at vita, hvar ein skal bora eftir olju.

Fyritøkan eitur Nopec og hevur skrivstovur í Noregi, Onglandi, USA og í Australia. Har arbeiða umleið 90 fólk.

Nils Nilsen Trulsvik er geofysikari og umsitingarligur stjóri í fyritøkuni.

Fyri tveimum árum síðani vóru fleiri norskar fyritøkur, ið arbeiða sum tænastufyritøkur hjá oljuvinnuni, lagdar saman, soleiðis at fyritøkan "Petroleum Exploration Consultants" í dag hevur meira enn 500 fólk í arbeiði. Í fjør hevði hon ein umsetning upp á 1 milliard. krónur.

Nopec arbeiðir í dag fyri flestu av teimum stóru oljufeløgunum.

Fyritøkan hevur lisens til at savna inn seismikk í Norðsjónum fyri bæði Danmark, Noreg og Ongland.

Í dag arbeiðir fyritøkan eisini í Nambia, Vietnam, Australia og Indonesia.

Upp á fyrispurning um nøkur donsk fyritøka finst, sum kann gera hetta arbeiðið sigur Thulsvik, at tað neyvan finst nøkur fyritøka har, sum kann javnmetast við Nopec. Danir hava tó skip, sum savna inn seismiskar upplýsingar.

## Kappingarførir

Hann heldur annars ikki, at føroyingar fara skeivir, um vit fáa eina norska fyritøku at taka sær av seismisku kanningunum við Føroyar.

-Tað er eingin grund til at fara út í verðina eftir hjálp, tá henda finst í Noregi. Tað er sum at fara yvir um ánna eftir vatnið. Vit hava sera gott orð á okkum sigur Nils Trulsvik

Nopec hevur saman við Kolan søkt um loyvi at fara undir seismiskar kanningar.

Føroyska fyritøkan Kolan hevur sent landsstýrinum umsókn og er farin í samarbeiði við Nopec. Nú um dagarnar var so fundur við landsstýrið, har landsstýrið varð kunnað um norsku fyritøkuna og ætlanir hennara.

Nils Trulsvik sigur víðari, at teirra fyritøka er avgjørt kappingarfør við øll onnur útlendsk feløg, sum arbeiða á økinum.

Nopec ger kanningarnar ókeypis. Arbeiðshátturin er tann, at fyritøkan savnar inn upplýsingar fyri egna rokning og selur teir víðari til oljuídnaðin. Men fyritreyurin er tann, at oljuídnaðurin er hugaður at keypa.

-Hava vit ongar kundar, so er greitt, at vit heldur ikki eru hugaðir at fara í gongd leggur Nils Trulsvik aftrat.

## Áhugi í oljuídnaðinum

Hann sigur víðari, at teir í dag kunnu siga, at tað í tí altjóða oljuumhvørvinum er áhugi fyri Føroyum. Og tað ger, at teirra fyritøka er sinnað at taka eina risiko og seta pengar upp á spæl í Føroyum.

Sleppa teir í gongd verður fyrst farið at kanna allar teir upplýsingar, sum longu nú finnast um undirgrundina.

Nopec-fyritøkan hevur longu fingið hendur á teimum upplýsingunum, sum eru almennir. Annars hevur fyritøkan drúgvar royndir á økinum norðan og vestan fyri Hetland og hava tí góðan kunnleika til jarðfrøðina har. Hetta kann vera ein hjálp, tá teir skulu til at kanna føroyska økið. Tað næsta verður so at vita, hvussu teir best fáa arbeitt í basaltløgunum. Her heldur hann, at royndir teirra at skjóta seismikk í Barentshavinum, har botnurin er sera harður, kann koma teimum til góða við Føroyar.

Trulsvik vil ikki úttala seg um møguleikarnar at finna olju við Føroyar. Hann bert vísir á, at olja er við Hetland. Spurningurin er tá, um tað eru somu sediment í føroysku undirgrundini sum við Hetland.

Hann vónar, at teir skjótt fáa svar uppá umsóknina frá landsstýrinum, og at hetta verður positivt.

## Markið upp á pláss

Ein av teimum óloystu spurningunum í sambandi við olju og undirgrund er ósemjan um markið millum Føroyar og Ongland. Sjálvur heldur hann tað hevur skund at fáa avgreitt hesa ósemju.

Um møguligar aðrar trupulleikar sigur stjórin í Nopec, at veðrið kann vera ein forðan fyri at kunna arbeiða alt árið, og tí má ein helst gera sær greitt, at ein kann bert arbeiða við veruligum seismiskum kanningar frá mars til september.

*-Nær kunnu tit fara í gongd?*

-Vit hava bátar, sum eru klárir og kunnu byrja longu í mars ella apríl. Men tað er sera umráðandi at fyrireika seg væl, soleiðis at ein ikki ger kanningar heilt í óvisssuni.

Talan verður helst um at gera ymsar forkanningar í ár og so fara undir tær veruligu seismisku kanningarnar í 1994.

Úrslitið av kanningunum kann tá verða klárt móti endanum at 1994.

Men møguleiki er eisini at framskunda hesar kanningar, um so er, at tað finst serkunnleiki í Føroyum ella hjá DGU, sum kann siga teimum, hvussu arbeiðið best kann gerast.

Trulsvik vísir á, at finnast týðandi upplýsingar hjá DGU og øðrum, sum kunnu siga meira um undirgrundina, so ber til at framskunda teirra kanningar, soleiðis at eitt endaligt úrslit longu kann vera greitt í ár.

Sleppur Nopec í gongd fer arbeiðið helst at kosta einar 20-30 mill. kr.

## Kanningarúrslit stóran týdning

-Vit fara so beinanvegin at seta okkum í samband við oljufeløg og vita, um tey vilja keypa møgulig komandi kanningarúrslit.

Trulsvik sigur víðari, at kanningarúrslitini teir koma til kunnu fáa stóran týdning fyri allar partar, bæði oljuídnaðin og so sjálvandi eisini fyri føroyskar myndugleikar um, hvussu víðari farast skal fram.

Upp á fyrispurning hvussu teir koma at fyrihalda seg til ta "gráu" leiðina, sum Føroyar og Bretland enn eru ósamd um, sigur Trulsvik, at teir hava ikki loyvi at gera seismiskar kanningar í einum øki, sum ósemja er um.

*-Kann tað ikki hugsast, at Føroyar og Bretland gera eina avtalu, sum gevur tykkum ella øðrum felag loyvi til eisini at gera seismiskar kanningar í tí økinum, sum ósemja er um?*

-Tað er ikki óhugsandi. Vit hava eitt dømi um júst eina líknandi støðu millum Australia og Indonesia. Tann 16. januar byrja vit seismiskar kanningar í einum tílíkum øki, sum ósemja annars er um, men har bæði londini einki hava ímóti kanningum sigur Nils Nilsen Trulsvik í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin.

jan